# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HEIMURIN Á FØROYSKUM

Mikil orðadráttur hevur verið um Heimsatlasið, síðan tað á fyrsta sinni kom út á føroyskum í 1993. Í síðstu viku var fundur í Miðlahúsinum við tí í hyggju at fáa fólkið á tal um, hvørja leið vit skulu ganga, nú Føroya Skúlabókagrunnur á øðrum sinni fer at geva út føroyskt heimsatlas.

Fyri okkum sum gingu í skúla við donskum og týskum atlasum og landakortum var tað kærkomið at síggja eina føroyska útgávu av heiminum – tí vit hava nógv landa- og býarnøvn, sum vit heilt natúrliga skriva á føroyskum: Vit siga Svøríki, Italia, Avstralia og Keypmannahavn, hóast vit í skúlanum lósu Sverige, Italien, Australien og København.

Men alt sjálvandi við máta. Tað kann ikki vera nøkur meining í at umseta púra fremmand landa- og býarnøvn úti í stóru verð til føroyskt bara soleiðis hissini. Fleiri dømi eru nevnd um tað, sum ikki skulu vera endurtikin her. Men at geva nøvnum natúrligt føroysk snið og endingar, tað er nakað annað. Hinvegin kunnu vit geva Sjúrði Skaale, løgtingsmanni, rætt, tá hann mælir til, at nøvnini verða skrivað við teimum »útihýstu« stavunum, sum løgtingið hevur samtykt at fáa í føroyska stavraðið - soleiðis at Chile verður stavað Chile og ikki Kili, og at Mexico verður stavað Mexico og ikki Meksiko.

Vit skulu vera fegin um, at vit hava havt so nógv eldhugað stríðsfólk gjøgnum tíðirnar, sum hava strembað so mikið, at vit hava varðveitt okkara móðurmál – og enntá endurkonstruerað skriftmálið. Meðan føroyskt varð talað, so varð danskt skrivað – eyðvitað nógv ávirkað av danska skriftmálinum. Hetta eiga vit ikki at forsmáa. Men vit skulu kortini vera varin, at vit ikki fara í hina grøvina, har vit ræðast alt, sum líkist donskum. Føroyska og danska málið eru runnin av somu germansku rót, og tí líkjast tey natúrliga, tí eiga vit ikki at vera ov fundamentalistisk í okkara uppfatan av góðum føroyskum málburði. Viðlíkahaldið av føroyska málinum eigur at snúgva seg um




so nógv annað, enn um Kristian eitur Christian ella Viktor eitur Victor. Her eiga vit í nógv størri mun at hugsa um málbygnaðin, um endingar, um ljóðlæru og ikki minst um dialektirnar, sum vit fyri alt í verðini mugu varðveita, tí tær ríka málið og gera tað fjølbroytt.

At gera eitt heimsatlas er annað og meira enn málfrøði. Tí er tað so sjálvsagt, at landafrøðin – geografiin – eigur at takast upp á ráð. Fyrsta føroyska heimsatlasið er gott. Men tað ger einki, um útgevarin tekur eitt sindur í egnan barm og á tann hátt ger tað enn betri.

**» At gera eitt heimsatlas er meira enn málfrøði**

# Einki kríggj

Stjórin á Rás2 avsannar, at tað er brostið kríggj á millum Rás2 og Kringvarpið, soleiðis sum tíðindini í Útvarpinum annars søgdu leygardagin.

Rás2 segði seg hava gjørt eksklusivar avtalur við Víking og EB/Streym um at útvarpa seinnu hálvfinalurnar í kappingini um løgmanssteypið, men Kringvarpið avvísti, at Rás2 kann gera slíkar avtalur og fáa einkarrætt at útvarpa ávísar fótbóltsdystir.

– Eg var kløkkur av at hoyra orðingina um, at tað er kríggj millum Rás2 og Kringvarpið, tí tað er tað á ongan hátt, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

– Samstarvið millum okkum og Kringvarpið hevur verið betri seinastu tíðina, enn tað ofta hevur verið, og samstarv fer eisini at loysa seg í longra lagi, sigur hann.

Hinvegin ætlar Rás2 sær ikki at útvarpa fótbóltsdystir, um Útvarpið eisini er til somu dystir.

– Tað er eingin meining í, at vit standa við síðuna av Útvarpinum og útvarpa fótbóltsdystir, og fer Útvarpið at siga frá seinnu hálvfinalunum í steypakappingini, og gera vit tað ikki. Vit gera tað bert, um vit fáa einkarrætt til dystirnar, sigur Jonhard Hammer.

– Vit eru tó altíð til reiðar at siga frá dystum, um feløgini ynskja tað, sigur hann.

# Simon Kvamm giftur



Um vikuskiftið giftist Simon Kvamm Stine Ellerbæk, ið er tíðindakvinna. Kendi sanganrin í Nephew og Stine eiga saman dóttrina Elinor Kvamm Ellerbæk, ið er 3 ár.

Brúdleypið var á Samsø og millum gestirnar taldust hinir í Drengene fra Angora, har Kvamm eisini tekur lut. Eisini vóru onnur gávurík innan satiru og undirhald millum teir 112 gestirnar, ið nærum allir gista á Brundby Hotel, har veitsla hevur verið Hvítusunnudagarnar.

At so nógv innan undirhaldsheimin eru við fær Ekstrablaðið at ivast í, hvørt talan bert er um enn eina upptøku til Krysters Kartel ella Drengene fra Angora.



**» Gestablíðir muslimar**

HEINI OLSEN
KJAK Á SÍÐU 34



**» Makrelurin sum profilering**

BJØRN KALSØ
KJAK Á SÍÐU 13



# FK í Klaksvík sett spakan í

Í morgun varð »spakin« settur í til at byggja nýggja Keypsamtøku í Klaksvík. Teir er farnir undir at taka asfaltið av og annars at gera fyrireikingar til bygging av Keypsamtøkuni, sum skal liggja við Nólsoyar Pálsgøtu niðan fyri býráðshúsini.

– Spakin er skiftur út við ein stóran fresara, so asfaltið kann verða tikið av. Í gomlum døgum hevði flagið verið loyst av av einum haka – so broytist, sigur Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar kommunu, sum hevur tikið myndina.

Keypssamtøkan skal byggja um 1100 fermetra stóran handil í Klaksvík.

Drúgv tilgongd hevur verið at fáa sett skjøtil á hesa bygging, sum byrjaði sína gongd miðskeiðis í 80-unum.

Men nú er byggingin so byrjað og skal vera liðug um ársskiftið.

Á myndini sæst ein gul strípa, sum sigur hvar bygningurin skal standa.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*